# Grindin væl fyri í ár

**Fyri fimmti árum síðani vóru hvalirnir bert fimm skinn í miðal. Í dag er talið helvtina størri.**

GRIND

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Gøta: Sum nevnt aðrastaðni í blaðnum legði ein stór grind beinini á Gøtusandi í gjár.
Grindin varð merkt til 131 hval og var skinnatalið 950.

Vanligt er at siga, at ein hvalur liggur um 6-7 skinn. Men sambært Jústinesi Olsen, djóralækna var grindin í Gøtu betri enn so.
- Miðaltalið í Gøtu var omanfyri sjey skinn – 7,3 skinn. Og tað má sigast at vera rættiliga gott, sigur hann við Sosialin.
Í februar mánaði í ár var eisini grind, og var henda eisini feit. Nógv bendir á, at grindin er væl fyri.
So er bert eftir at vóna, at fleiri fáa gagn av henni í summar.



*Drápið var væl fyriskipað frá byrjan til enda*

## FAKTA

Grindaveiða 50 ár aftur
Ójavnt hevur verið, hvussu grindin hevur verið fyri seinastu 50 árini. Her er eitt yvirlit yvir tal av grindum, hvalum og miðaltali á skinnum.

1956: 13 grindir, 1816 hvalir, 9180 skinn = 5,0 skinn í miðal
1966: 13 grindir, 1485 hvalir, 6956 = 4,6 skinn í miðal
1976: 6 grindir, 532 hvalir, 3272 skinn = 6,2 skinn í miðal
1986: 20 grindir, 1676 hvalir, 10708 skinn = 6,3 skinn í miðal
1996: 15 grindir, 1512 hvalir, 11095 skinn = 7,3 skinn í miðal
2005: 6 grindir, 302 hvalir, 2194 skinn = 7,3 skinn í miðal
7. august 2006 í Gøtu: 131 hvalir, 950 skinn = 7,3 skinn í miðal

Kelda: Hagstovan


Best røkta bygd 2006

Ferðaráð Føroya vil við hesum takka teimum bygdum og býlingum, sum luttóku í tiltakinum Best røkta bygd 2006.
Ein stór tøkk til tey virki og stovnar sum á ein ella annan hátt stuðlaðu tiltakinum.

Tøkk til :
Agenda 21 Stovan
Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Føroya Náttúru – og Umhvørvisverndarfelag
Føroya Fornminnissavn
Arkitektafelag Føroya

Fámjin
Best røkta bygd 2006
& Best røkta strandalinja

Hósvík
2. pláss Best røkta bygd 2006
& Best røkta á

Sandvík
3. pláss Best røkta bygd 2006

Tórsbyrgi
Besta átak

Stuðlar:
Statoil
Suðuroyar Sparikassi
Føroya Banki
Føroya Sparikassi
Innlendismáláráðið

Ferðaráð Føroya
Undir bryggjubakka 17 - Postsmoga 118 - FO 110 Tórshavn
Telefon 355800 – Fax 355801 – tourist@tourist.fo - www.tourist.fo